# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MORÐ, FOTBÓLTUR OG GRINDADRÁÐ

So upplivdu vit tað aftur, at týskur umhvørvisfelagsskapur roynir at steðga føroyskum grindadrápi - hesaferð við at lata tað ganga út yvir fótbóltin. Felagsskapurin eitur Prowal, og hann hevur havt tveir mans í Føroyum í summar. Nú hava teir skrivað brævtil UEFA, FIFA og føroyskar og danskar myndugleikar - og til fjølmiðlarnar.

Viðhvørt kunnu vit ivast í, hvønn slíkir felagsskapir arbeiða fyri, og hvat veruliga endamálið er. Ein maður frá hesum felagsskapi ringdi til okkum ein dagin í august, tí hann vildi hava at vita, um tað passaði, at grindamenn í Húsavík høvdu bundið grindahvalir fastar í bátarnar, tí náttin kom á teir, áðrenn grindin kundi haldast til.

Men onkur fíggjar slíkt virksemi - og vit kunnu ikki lata vera við at misteinkja slík fólk fyri at gera hetta meira til stuttleika enn tí at tey veruliga meina tað. Um hesi báðir menninir meintu tað í álvara, hví kunnu teir so ikki seta seg inn í veruligu umstøðurnar og lýsa tær veruliga, heldur enn at møsna um, at »they make a public festival out of it. For the young men, the killing is a token of strength and selfaffirmation...«

Søgan hevur jú sagt okkum, at eitt nú kendir sjónleikarar og tónleikarar nýta umhvørvisfelagsskapir sum hjáputur at vinna sær meira tokka millum fólk - har eru so bæði fólk sum Brigitte Bardot og Paul McCartney.

Vit hava sagt tað fyrr, at slík fólk áttu heldur at steðgað sínum egnum londum í at drepa fólk, áðrenn tey leggjast á smátjóðir, í hesum føri eina grindahvalaveiðutjóð, sum fólkini á meginlandinum als ikki skilja.

Sjálvt lond sum Danmark senda ungar menn í kríggj, og bara meðan stjórnirnar hjá Andres Fogh Rasmussen og Lars Løkke Rasmussen hava sitið seinastu níggju árini eru umleið 50 ungir danir sendir í deyðan. Tony Blair sendi 165 ungar landsmenn í deyðan í Irak, meðan Gorge W. Bush sendi fleiri túsund av sínum landsmonnum í deyðan.



Hetta hevði verið nakað at skrivað heim um. Og at biðið FIFA og UEFA boykottað slík lond. Tað hevði givið respekt.

Sjálvsagt fer FIFA ikki at taka sær av slíkum fjasi, sum hesir báðir týsku umhvørvisaktivistarnir fáast við.

Men tey nýtast ikki óttast niðri í Evropa. Stovnurin av grindahvali er ríkiliga stórur, veiðan er lítil, men grindadrápið í Føroyum syngur helst síðsta vers - av teirri einfaldu orsøk, at heimlondini hjá hesum sokallaðu umhvørvisfelagsskapum dálka okkum umhvørvið so illa, at grindin ikki er etandi sum mannaføði.

**» Sjálvsagt fer FIFA ikki at taka av slíkum fjasi**

## Kringvarp fór um egið mark



Tað var tann tíð, tá sensururin í Útvarpinum var strangari, enn hann er í dag. Í áhugaverdu sendingini hjá Suna Merkistein um føroysku tónleikasøguna, fór Kringvarpið hóskvøldið um egin gomul mørk, tá tey vístu Anniku Hoydal spillnakna. Tað vardi bert í 13 sekund - og tað var meðan Harkaliðið sang »Lisa eitur genta mín« og Annika sang linjuna »... ljótt er at gera tað...«

Beint frammanundan varð tosað um sangin »Fimtan ár« hjá Gunnari Hoydal, sum í síni tíð var »øðiliga ljótur«, tí hann var um gentuna, sum búnaðist til kvinnu: »Tá eg var fjúrtan, fór okkurt í mær at kitla«.

Hóast vit hava hugt at sendingini aftur, so síggja vit ikki ordiliga samanhangin við at vísa Anniku Hoydal nakna í eini slíkari sending, men vit gita, at senan er úr filminum hjá Peter Rafn frá 1975, »Violer er blå«, har Annika Hoydal hevði leiklutin sum tann biseksuella Suzanne, og vit gita eisini, at sangirnir »Fimtan ár« og »Lisa eitur genta mín«, hava beint tankarnar hjá Suna Merkistein á nakinsenuna hjá Anniku Hoydal í »Violer er blå«.

Soleiðis fer tíðin við okkum øllum...

## Taka børn upp eftir aldri

Tann 1. oktober komu nýggjar upptøkureglur í gildið fyri dagstovnaøkið í Tórshavnar kommunu. Tað nýggja í reglunum er, at børn nú verða upptikin eftir aldri, og ikki eftir nær tey vera uppskrivað á listan.

Sambært Tórshavnar kommunu er hetta er gjørt, so elstu børnini fáa fyrst boðið stovnsplláss, somuleiðis at javngomul børn eru á stovnunum. Hetta er vanlig mannagongd í hinum norðanlondunum.

Ein onnur broyting við reglunum er, at foreldur, sum eru undir útbúgving ella hava eina ávísa uppgávu at loysa – og búgva uttanlands, fáa børnini ansað í tveir til seks mánaðir, treytað av, at tey hava váttan frá útbúgvingarstað ella arbeiðsgevara, og talan er um avmarkað tíðarskeið. Hetta so lesandi kunnu koma heim og ikki missa sambandið við Føroyar.



**» Rósa snarar fokus**

SIGRUN WARDUM
KJAK Á SÍÐU 33



**» Høllin við Landavegin**

JÓGVAN ARGE
KJAK Á SÍÐU 16



## Fyrireika jólahald

Havnar kommuna er í jólahýri - í øllum førum eru tey farin at fyrireika jólahaldið í miðbýnum í Havn, og fólk kunnu nú søkja um søluloyvi til ymsu tiltøkini. Nógv tiltøk plaga at vera fastur táttur í jólahaldinum í miðbýnum í Havn.

Høvi verða hjá fólki og feløgum at selja alskyns mat, jólaprýði, heimabakstur, blómur, jólatrø, bøkur, klæðir og mangt annað. Tað er bert hugflogið, sum setir mark. Tó krevst eitt søluloyvi frá Tórshavnar kommunu. Søkjast kann um loyvi við sjálvavgreiðslu á heimasíðuni hjá kommununi ella við at fylla út oyðublað, ið fæst frá Snarskivuni.

Eisini tey, ið hava hug at hugna um miðbýin í jólamánaðinum, skulu boða kommununi frá hesum, t.v.s. øll, ið ynskja at syngja, framføra okkurt ella hava onkra framsýning, skulu siga frá hjá kommununi, so teirra tiltak kann gerast partur av skránni fyri »Jól í miðbýnum«. Søkjast kann um luttøku á jol@torshavn.fo ella á www.torshavn.fo.

Sum vant verður nógv gjørt burturúr í miðbýnum jólamánaðin, og í ár eru fleiri nýggj tiltøk á skránni. Allar jólasmátturnar verða umskapaðar til ein lívligan jólamarknað við nógvum úrvali av jólaprýði, mati, upplivingum og framsýningum. Tá stóra jólatræið á Vaglinum verður tendrað leygardagin 27. november fær miðbýurin vitjan av jólamonnum og vættrum, brandbilinum, stigabilinum eins og kórsangur fer at ljóma.

Jólasøla verður oman eftir gongugøtuni og aðra staðni í miðbýnum - og borgarstjórin heldur røðu.

Sosialurin Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo